

Magni Arge er formaður í Oljuvinnufelagnum, sum hevur ábyrgdina av at skipa fyri føroysku luttøkuni á oljumessuni í Aberdeen í heyst. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Føroyar við í skotska oljuhøvuðsstaðnum

**Jan Müller**

16.03.2015 - 23:05

Oljan.fo

**Aftur í ár verður skipað fyri føroyskum landabási á Offshore Europe í Aberdeen. Føroyar hava luttikið á oljumessunum í Aberdeen og Stavanger annaðhvørt ár hesi mongu seinastu árini.Í meðal plaga at vera millum 10 og 15 fyritøkur, stovnar og kommunur við. Endamálið er at kunna marknaðarføra føroyska luttøku í oljuvinnu, skapa sambond og samstarv.**

**Oljuvinnufelagið hevur ábyrgdina av samskipanini av landabásinum, og avtala er gjørd við Ólavur í Geil um at taka sær av øllum tí praktiska í sambandi við básin. Offshore Europe er í døgunum 8. - 11. september. 62N skipar fyri ferðing í sambandi við messuna.**

**Tilmelding til Offshore Europe 2015 fer fram í seinasta lagi týsdagin 31. mars hjá Ólavi í Geil á olavur@advent.fo ella hjá Jórun Gardar á jorun@industry.fo.**

**Sí meira um tiltakið á www.industry.fo**